# Ókeypis koyring í eina viku

**Sum liður í hátíðarhaldinum tá Norðoyatunnilin letur upp, verður tað ókeypis at koyra ígjøgnum báðar undirsjóvartunlarnar frá 29. apríl til 7. mei.**

HÁTÍÐARHALD

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Ókeypis koyring gjøgnum bæði Norðoya- og Vágatunnilin í eina viku. Soleiðis hevur nevndin fyri Norðoyatunnilin valt at markera eina sera væl eydnaða verkætlan, tá Norðoyatunnilin letur upp síðst í hesum mánaðinum, segði Bergur í Garði, nevndarforðmaður á tíðindafundi í gjár.

### Fólksligt íkast

Bergur í Garði vísti á, at í eini so stórari og kostnaðarmiklari verkætlanin sum hesi, slepst ikki undan, at trupulleikar stinga seg upp á vegnum.

– At arbeiðið kortini hevur gingið so fyrimyndarliga væl kemst av óvanliga góða viljanum hjá øllum pørtum, segði hann og legði afturat, at tað eisini hevði verið sera hugaligt at uppliva stóra áhugan hjá fólki fyri arbeiðinum við tunlinum. Tí hevur nevndin ynskt, at teirra íkast til hátíðarhaldið skuldi vera av einum fólksligum slag og koma so nógvum, sum til ber, til góðar.

Sostatt verðu tað ókeypis at koyra gjøgnum tunnilin fyrstu vikuna, umframt at avtala er gjørd við nevndina fyri Vágatunnilin um, at koyringin eisini har verður ókeypis frá á midnátt kvøldið fyri og eina viku fram.

### Symbolsk skrúðgonga

Umframt stóru tunnilsrenningina, sum verður nú sunnudagin, byrjar skráin fyri hátíðarhaldið annars so smátt 27. apríl við ymsum tiltøkum runt um í býnum. Sjálvur hátíðardagurin byrjar á ferjuleguni, tá Dúgvan leggur at á Klaksvík fyri seinastu ferð kl 13. Tikið verður ímóti við tónleiki, har Klaksvíkar Hornorkestur fer at spæla tunnilsmarchin Blast, ið er serliga gjørdur til hátíðarhaldið. Eisini fara Jacob Vestergaard, landsstýrismaður og Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni at halda røðu.

Tá Klaksvíkin soleiðis hevur sagt farvæl við farleiðina um Leirvíksfjørð, leggur ein symbolsk skrúðgonga við bilafylgi leiðina niðan til tunnismunnan. Út á seinnapartin verða farna og komandi tíðin umframt økini bundin saman, tá bilafylgið heldur fram við løgmanni á odda í gjøgnum tunnilin og niðan til bygdarhúsið í Leirvík, har leirvíkingar eisini gera okkurt serstakt burtúr degnum.

Hesa løtuna, frá tí Dúgvan leggur at fyri seinastu ferð til tunnilin letur upp fyri almennari ferðslu kl 16.30, verður onki samband til Klaksvíkar. Dúgvan og Ternan hava tá lagt seg á Borðoyavík fyri á tann hátt at verða partur av stóra hátíðarhaldinum kring tunnilsmunnan og Klingrugarð. Umframt røður, tónleik og kórsang verður eisini boðið til kaffiborð og ein bita av ovurstóru tunnilskøkuni. Tá hesin parturin av hátíðarhaldinum er av, koyra bussar frá Klingrugarði til Leirvíkar við fólki, sum vilja fara eftir bilum á ferjuleguni.

Út á kvøldið verður hildið á við millum annað at handlarnir í býnum hava opið til langt út á kvøldið, ókeypis tunnilsdansi í KÍ høllini, midnáttar ljósshowi og fýrverki.

### Stórur áhugi

Á tíðindafundinum í gjár fegnaðust fyrireikararnir um góða samstarvið, sum hevur merkt arbeiðið við at skipa hetta hátíðarhaldið, sum kanska er eitt tað størsta í Føroyum nakrantíð. Alt bendir eisini á, at áhugin millum fólk er sera stórur. Eitt nú hava út við 3000 fólk teknað seg til tunnilsrenningina, og væl yvir 1000 kubbar eru longu seldir. Eisini vita tey á Norðoya Kunningarstovu at siga, at nógv fólk hava bílagt sær summarhús í Norðoyggjum hátíðarvikuskiftið, umframt at Campingfelagið hevur bílagt sær pláss til einar 40 campingvognar á Tjaldingarplássinum úti í Grøv.



*Umboð fyri fyrireikarnar av hátíðarhaldinum: Kristian Olsen, Kunningarstovan, Guttorm Sørensen, Treystið, Dávur Winther og Steintór Rasmussen, samskiparar, Bergur í Garði og Dávur Reinert Hansen, Norðoyatunnilin, og Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri*

| Dagfesting | Frá kl. | Til kl. | Heiti | Staðseting |
|---|---|---|---|---|
| 27/04/06 | 19:00 | 23:00 | **Musik café** | Tilhaldið Sóljan, Klaksvíksvegur 35 |
| 28/04/06 | 16:00 | 23:00 | **Fornminni runt Borðoyarvík** | Leikalund |
| | 19:00 | | **Bambi 2** | Atlantis |
| 29/04/06 | 7:15 | 13:00 | **Dúgvan og Ternan flyta fólk um fjørðin** | ferjulegan - í Klaksvík |
| | 9:30 | 10:00 | **Livandi tónleikur** | við ferjuleguna |
| | 10:00 | 13:00 | **"Farvæl Dúgvan" - tiltak í bygninginum hjá Farmaleiðum** | við ferjuleguna |
| | 10:00 | 14:00 | **Hondlesing í Leikalund** | Leikalund |
| | 10:00 | 12:00 | **Úrval úr savni hjá Norðoya Listafelag** | Skúlin við Ósánna |
| | 10:00 | 13:00 | **Framsýningin Klaksvíkar Sjúkrahús** | Klaksvíkar Sjúkrahús |
| | 10:00 | 2:00 | **Fornminni runt Borðoyarvík** | Leikalund |
| | 10:00 | 14:00 | **Dáin - opið hús umlættingarheimið** | Dáin Mýruvegur 11 |
| | 11.00 | 12:30 | **Hugnaløta í Býráðshøllini Pætur og Tóra við Keldu og 17 Sangarar framføra tónleik** | Býráðshøllini |
| | 13.00 | | **Dúgvan kemur seinasta túrin av Lorvík - Røður verða hildnar Kristian Davidsen, strandferðslustjóri og Landstýrismaðurin Jacob Vertergaard** | ferjulegan - í Klaksvík |
| | 13.45 | 14:15 | **Skrúðgonga frá ferjuleguni og niðan til Tunnilsmunnan** | ferjulegan - Tunnilin |
| | 14:15 | 15:30 | **Tunnils-hátíðarhald** | Tunnilsmunnin |
| | 15:45 | 17:00 | **Stórt kaffiborð í Klingrugarði** | Klingrugarður |
| | 15:30 | 17:00 | **Tunnilskakan, kaffi og undirhald** | Klingrugarðurin |
| | | | | |
| | 16:30 | | **Tunnilin opin** | |
| | | | | |
| | 16:00 | 20:00 | **Norðoya Motorsavn letur upp** | Gamla skúla í Norðdepli |
| | 16:00 | 18:00 | **opið hús umlættingarheimið Dáin** | Dáin Mýruvegur 11 |
| | 16:00 | 22:00 | **Søluframsýning Vardur verkstaður** | Nólsoyar Páls gøta 9 |
| | 16:00 | | **Hondlesing í Leikalund** | Leikalund |
| | 16:30 | 23:00 | **Úrval úr savni hjá Norðoya Listafelag** | Skúlin við Ósánna |
| | | | | |
| | 17:00 | 19:00 | **Magna Auðunsson - Listaframsýning** | Kunningarstovan |
| | 17:00 | 21:00 | **Opið hús í Betesda** | Betesda |
| | 17:00 | | **Barnasjónleikur - Hvør vann í dag** | Atlantis |
| | 17:00 | 23:00 | **Spinnaríið hjá Monu hevur opið hús** | Klaksvíksvegur 54 |
| | 17:00 | 2:00 | **Opið út á kvøldið** | Handlarnir í Klaksvíkar Handilsfelag |
| | 17:00 | 21:00 | **Opið hús í Betesda** | Betesda |
| | 18:00 | 20:00 | **Víkingatiltak fyri børn** | Miðbýnum, við kirkjuna |
| | 19:00 | | **Bambi 2** | Atlantis |
| | 19:00 | 20:30 | **Tunnils svimjing** | Klakksvíkar Svimjihøll |
| | 19:00 | 23:00 | **Framsýning á bókasavninum - Farleiðin um Lorvíksfjørð** | Klaksvíkar Bókasavn |
| | 20:00 | 23:00 | **Hugnakvøld í Leikalund við Hanus G. Johansen, Hans Hjalta Skaale og fl.** | Leikalund |
| | | | | |
| | 20:00 | 21:00 | **The Dreams spæla** | Virkishúsið |
| | 21:00 | | **Inside man** | Atlantis |
| | 22:00 | 1:00 | **KFUM & K opið hús Tónleikur og drekkamunnur** | |
| | | | **Lovsongsløta Betesda** | Betesda |
| | 23:00 | 3:00 | **Føroyskur Dansur í Skálanum** | Skálin |
| | 23:30 | 24.00 | **Miðnáttar ljóðshow** | Miðbýnum - Akursmørk |
| | | | | |
| | 24.00 | | **Fýrverkið í miðbýnum** | á Sandinum |
| | 24.00 | 4:00 | **Diskotek í BAROK** | BAROK |
| | 24.15 | 4:00 | **Tunnilsdansur í Kí-Høllini - Stórdansur Klax: Karl Martin Samuelsen, Eyðun Nolsøe, Mikkjal Hvannastein, Magni Husgaard og Høgni Klakkstein - 00.15 - 01.00 DIXI 01.00 - 01.45 Klax & Arnfríð 01.45 - 02.30 Klax & Karl Martin 02.03 - 03.00 Sámal Ravnsfjall 03.00 - 03.45 Klax & Anfinn 03.45 - 04.00 Finala** | KÍ-Høllin |
| | | | | |
| 30/04/06 | | | | |
| | 13:00 | 16:00 | **Framsýningin Klaksvíkar Sjúkrahús** | Klaksvíkar Sjúkrahús |
| | 15:00 | | **Fótbóltur B68 - KÍ** | á Toftum |
| | 15:00 | 20:00 | **Spinnaríið hjá Monu hevur opið hús!** | Klaksvíksvegur 54 |
| | 15:00 | 20:00 | **Úrval úr savni hjá Norðoya Listafelag** | Skúlin við Ósánna |
| | 15:00 | 23:00 | **Fornminni runt Borðoyarvík** | Leikalund |
| | 17:00 | | **Barnasjónleikur - Hvør vann í dag** | Atlantis |
| | 19:00 | | **Bambi 2** | Atlantis |
| | 21:00 | | **Inside man** | Atlantis |
| | | | | |
| | 21:00 | 21:50 | **Messias í Christianskirkjuni - SUÐ syngur** | Christianskirkjan |